# Stjóri
## til Matrikulstovuna

Við hesum verður søkt eftir stjóra til Matrikulstovuna.

Matrikulstovan
Matrikulstovan er stovnur undir Vinnumálastýrinum.

Matrikulstovan skal, sambært lóg, hava fullfíggjaða skráseting av øllum føstum ognum í Føroyum - matrikulin, og vera før fyri at seta mark millum fastar ognir út frá skrásettum mørkum, matrikulkortum og málibløðum. Grundarlagið undir hesum er fikspunktnetið, sum stovnurin umsitur og røkir.

Matrikulstovan umsitur eisini altjóða netini í samstarvi við KMS (Kort- og Matrikelstyrelsen). Harumframt skal Matrikulstovan, sambært lóg, útinna tað arbeiði, henni verður álagt av útskiftingini í sambandi við broytingar til bata fyri jarðarbrúkið.

Starvið
Stjórin hevur ábyrgdina av at leiða, reka og menna stovnin, og skal fremja tær uppgávur og ætlanir, sum eru lagdar til Matrikulstovuna.

Førleiki
Vit vænta okkum av umsøkjarum, at teir hava:
- Viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni, eitt nú landinspektør, útskiftingarkandidatur, løgfrøðingur, verkfrøðingur ella tílíka útbúgving
- Leiðsluroyndir frá almenna og/ella privata arbeiðsmarknaðinum
- Góð samstarvsevni og mennandi leiðslustíl

Førleikakrøv
Vit vænta okkum, at umsøkjararnir m.a. hava:
- Hægri útbúgving innan løgfrøði, búskaparfrøði, umsiting e.l.
- Royndir á økinum ella sum heild innan almenna og/ella privata fyrisiting
- Góð samstarvsevni, umframt mennandi leiðslustíl

Setanarviðurskifti
Talan er um tænastumannastarv 37. lønarflokki. Starvsheiti er stjóri, og tænastustaðurin er fyribils Matrikulstovan. Setanarøkið er Vinnumálastýrið og stovnar undir tí.

Umsókn
Umsókn við prógvum, starvsroyndum o.ø. verður send til:

Vinnumálastýrið
Postrúm 377
FO-110 Tórshavn

Umsóknin skal verða Vinnumálastýrinum í hendi í seinasta lagi 26. mars 2001.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Arna Poulsen, aðalstjóra í Vinnumálastýrinum, tel 35 60 60.

VINNUMÁLASTÝRIÐ

STRANDFARASKIP LANDSINS



# LASTBILUR TIL SØLU

1lastbilur av merkinum MAN 8F L2 er til sølu.
Er skrásettur fyrstu ferð 09/95 og hevur koyrt 216.000 km.
Lastievnið er 4.000 kg. Síðst sýnaður 02/00.
Er útgjørdur við 1,5 t Z-lift og prosendingskassa við lúkum og alu-dørki.
Er í sera góðum standi.

**Áhugaði kunnu ringja til Strandfaraskip Landsins á tlf. 213061 ella 213046**

**mentamálastýrið**
**Vinnu- og miðnámsskúladeildin**

# UPPTØKA TIL JOURNALIST-ÚTBÚGVING

Tey, ið ætla sær til upptøkuroynd til útbúgving á Danmarks Journalisthøjskole, fáa umsóknarblað og faldarar við at venda sær til Mentamálastýrið, telefon 355050.

Umsóknarblaðið og avrit av dóps- ella navnsbrævi skal vera Danmarks Journalisthøjskole, Olof Palmes Allé 11, DK-8200 Århus N, í hendi sum skjótast og í seinasta lagi 15. mars 2001.

Raðfestingarblaðið (prioritetsskema) skal sendast tí skúla, sum umsøkjarin setur sum 1. raðfesting.

Upptøkuroyndin verður 5. mai 2001, kl. 08.00 á Føroya Handilsskúla, Marknagilsvegi 77, 100 Tórshavn.

**Mentamálastýrið**
Postrúm 3279 • 110 Tórshavn
Telefon 35 50 50 • Telefax 35 50 55

i
Sosialurin

Norðurlandahúsið í Føroyum
Sí SVF tekstvarp s. 650

Restorffs ASSU

Sosialurin
Lesið Sosialin -tað loysir seg!



# Álítandi starvsfólk m/k til klædnahandil í

Til klædnahandil í Tórshavn søknast vit eftir einum álítandi persóni uml. 25-45 ár, tó eingin treyt, at byrja skjótast til ber.

Vit ynskja, at tú ert sjálvbjargin, sølumentaður, kundavinarligur og áhugaður í klædnamótanum í síni heild.

Vit bjóða tær eitt sjálvstøðugt arbeiði, har tú kemur at taka tær av dagliga rakstrinum, í einum spennandi umhvørvi har nakað hendir.

Skrivlig umsókn, har tú sigur nakað um teg sjálvan, verður at senda til:

**Bill. mrk. 4720**

# Aðalfundur

Aðalfundurin verður í Norðurlandahúsinum leygardagin tann 7. apríl 2001 klokkan 13.30 við hesi skrá:

1. Frágreiðing frá virki felagsins í farna ári
2. Grannskoðaður roknskapur verður lagdur fram
3. Val av tveimum nevndarlimum og trimum eykalimum
4. Val av grannskoðara
5. Ásetan av limagjaldi
6. Innkomin mál
7. Ymiskt

Gestarøðarar í ár verða: Doreta Bloch og Kristian Loftson.

Aðalfundurin er almennur.

Gjørt verður vart við, at mál, sum ynskjast viðgjørd sambært punkt 6, skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi 7 dagar fyri aðalfundin.

Høvi er altíð hjá áhugaðum at gerast limir í »Grindamannafelagnum«.

**Nevndin fyri »Grindamannafelagið« Fútalág 40, 100 Tórshavn**

GRINDAMANNAFELAGID 1993 1584

Elin Danielsen
Útb. fysioterapeutur
Dr. Jakobsensgøta 22
100 Tórshavn
Tlf. 21 44 77

ORKU TIL VØDDARNAR - KROPPIN Í JAVNVÁG
HITA · MASSAGU · LINNA

Eingin sáttmáli er við Sjúkrakassan

# Fakligur skrivari til sjúkrasystrafelag Føroya

Søkt verður eftir fakligum skrivara til skrivstovu felagsins at byrja 1. apríl 2001, ella eftir nærri avtalu, til 31. mars 2002.

Okkum tørvar eina sjúkrasystir, sum
- hevur áhuga at verða við til av menna Sjúkrasystrafelagið bæði yrkisliga og fakfelagsliga
- hevur holla vitan um heilsu- og sjúkrarøkt
- møguliga hevur víðari útbúgving
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- hevur góð samstarvsevni

Starvið er uppá niðursetta tíð.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til forkvinnu felagsins á tlf. 311309

Umsókn við avriti av prógvi og autorisatión, skulu verða felagnum í hendi 23. mars kl. 14.00.

**Sjúkrasystrafelag Føroya**

# Skrivstovu-/ Teknistovuhølir

Góð og ljós skrivstovuhølir/teknustovuhølir til leigu.

Talan er um 150m² í einari hædd við fundarhøli, skrivstovum, køki go tveimum toilettum. Góð parkeringspláss.

Nærri upplýsingar á tlf. 311139 og 315380 ella 311071.

# Dagrøktarmammur

Dagrøktarskipanin í Viðareiðis Kommunu søkir eftir dagrøktarmammum at byrja 01.04.2001, ella sum skjótast.

Møguligar umsóknir verða at senda til Dagrøktarskipanina innan 15.03.2001.

**Dagrøktarskipanin**
750 Viðareiði
Tlf. 451241

# Ársaðalfundur

Eysturoyar Fólkaflokksfelag hevur ársaðalfund á restaurant Muntra í Fuglafirði hóskvøldið 22. mars 2001 kl. 19.30.

**Eysturoyar Fólkaflokksfelag**

# Norðurbryggjan – Hugskotskapping

Norðurbryggjan er verkætlan um eina felags grønlendska, íslendska og føroyska umboðs- og mentanarmiðstøð. Til hetta endamál verða innrættað eini uml. 200 ára gomul, stór pakkhús í Keypmannahavn, sum upprunaliga vóru nýtt í sambandi við samhandil millum Grønlands, Íslands, Føroyar, Finnmarkar og Danmarkar.

Vegna Løgmansskrivstovuna verður við hesum boðið til almenna hugskotskapping um innrætting av føroyska partinum av Norðurbryggjuni.

Kappingartilfar fæst við at venda sær skrivliga til:
LV- Arkitektadeildin
Tinghúsvegur 5
Postsmoga 78
110 Tórshavn
e-post: olej@lv.fo
ella til kappingarskrivaran: tl@tst.fo

Seinasta freist at biðja um kappingartilfar er mikudagin 14. mars 2001.

**ARKITEKTAFELAG FØROYA**

# Frá Føroya Psoriasisfelag

**Nýggj viðgerðarferð til Bláalónið í Íslandi verður frá 27.04. til 25.05.**

Tey, ið hava tørv á viðgerð og ynskja at verða við á omanfyrinevndu viðgerðarferð, verða biðin um at fara til egnan kommunulækna at fylla út umsóknarblað. Umsóknarblaðið skal vera húðlæknanum í hendi í seinasta lagi 12.03. Kommunulæknin sendir umsóknarblaðið til húðlæknan. Húðlæknin viðger allar umsóknir og fáa umsøkjarar boð frá honum at møta til viðtalu.

**Føroya Psoriasisfelag**
Tlf. 424179

# Bilur við skaða til sølu

Ein Toyota Yaris 1,0 Sol 5 hurðar.

Bilurin hevur skaða í vinstru síðu og verður seldur fyri hægsta boð sum hann stendur við skaða. Skrásettur fyrstu ferð 15.11.2000.
Km. 2.500

REYNI-SERVICE
**tlf. 313040 · lokal 20-27**